

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 08 - 2012

# Seismiskar kanningar og hvalakanningar í Grønlandi

Oljufeløgini Shell, Mærsk og ConocoPhillips fara nú undir eina røð av seismiskum kanningum í Baffinvíkini vestan fyri Grønland fyri at fáa staðfest, um sannlíkindi eru fyri, at olja kann vera undir havbotninum har. Í sambandi við hesar kanningarnar skipa Grønlands Naturinstitut og DCE í Danmark fyri trimum sjálvstøðugum hvalakanningum í Melvillevíkini og tí norðara partinum av Baffinvíkini. Tann fysta kanningin snýr seg um, hvussu nógv ljóðbylgjurnar frá seismiskum kanningum breiða seg ígjøgnum sjógvin í Grønlandi. Í øðrum lagi skal kannast, hvar náhvalurin heldur til undan, undir og aftan á kanningarnar, samstundis sum ætlanin er at kanna, hvussu stórur náhvalastovnurin í Baffinvíkini er. Tann triðja kanningin hevur til endamáls at savna lokala vitan um veiðivirksemið í Melvillevíkini, meðan tær seismisku kanningarnar eru í gongd. Tað er staðfest, at hvalur varnast ljóð, og at hann letur seg ávirkað av mannaskaptum ljóði, men vísindin hevur hinvegin lítla vitan um, hvussu nógv ljóðbylgjurnar breiða seg í sjónum við Grønland. Ætlanin er, at kanningarnar í Baffinvíkini skulu útvega nágreiniligar upplýsingar um ljóðið frá seismiskum virksemi. Úrslitini verða væntandi tøk eina ferð næsta ár, sigur kringvarpið í Nuuk.